# Avbjóðingin er at venda gongdini í Sandoy

**- Ein framhaldandi gongd við vaksandi lutfalli av fólkinum í teimum eldri aldursbólkunum, færri kvinnum í burðarførum aldri og ein minkandi føðitíttleika kann føra við sær, at Sandoyar Sýsla kemur í eina negativa ringrás, har fólkatalið minkar ár um ár, sigur Granskingardepilin fyri Økismenning**

GRANSKING
*Tíðindaskriv*

Granskingardepilin fyri Økismenning hevur givið út Arbeiðsrit 13/2007 við heitinum "Fólk og vinna í Sandoyar Sýslu í 2006". Dennis Holm, samfelagsfrøðingur og Bogi Mortensen, siviløkonomur, hava skrivað arbeiðsritið

Arbeiðsritið setir fokus á fólk og vinnu í Sandoyar Sýslu.

Í fyrsta lagi verður gongdin í fólkatalinum í Sandoyar Sýslu viðgjørd, herundir viðurskifti viðvíkjandi til- og fráflyting, burðaravlop og broytingar í alders- og kynsamanseting. Her er ein av greiðu niðurstøðunum, at tað er ein stór avbjóðingin í Sandoyar Sýslu at venda teirri skeivu gongdini, sum hevur verið tey seinastu ártíggjuni, tá umrøður gongdina og samansetingina í fólkatalinum. Ein framhaldandi gongd við vaksandi lutfalli av fólkinum í teimum eldri aldursbólkunum, færri kvinnum í burðarførum aldri og ein minkandi føðitíttleika kann føra við sær, at Sandoyar Sýsla kemur í eina negativa ringrás, har fólkatalið minkar ár um ár. Við tíðini vil ein nýggj javnvág verða nádd, sum er væl lægri enn tað støðið, við kenna í dag.

Í øðrum lagi viðger arbeiðsritið vinnuligu støðuna í Sandoyar Sýslu. Hendan viðgerðin er býtt í tvey. Fyrri parturin fevnir um lýsing av tal av parta- og smápartafeløgum. Innan hvørjar vinnur virka feløgini, og hvussu nógv parta- og smápartafeløg eru í Sandoyar Sýslu samanborið við onnur øki í landinum og við støðuna í landinum sum heild. Seinni parturin fevnir um eina lýsing av roknskaparligu gongdini hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu – bæði hjá vinnuni undir einum og býtt í vinnubólkar.

Í vinnuligum høpi hevur gongdin undir einum verið skeiva vegin í nøkur ár, og hóast árið 2005 roknskaparliga eydnaðist betri enn árið 2004, so hevði vinnan undir einum eitt hall áðrenn skatt í 2005. Í løtuni (februar 2007) ber illa til at siga nakað um hvussu gongdin hjá vinnulívinum í Sandoyar Sýslu hevur verið í 2006, tí roknskapir eru vanliga ikki tøkir fyrr enn árið er hálvrunnið ella seinni.

Hetta arbeiðsritið gevur eina greiða ábending um, at vakstrarmøguleikarnir í Sandoyar Sýslu í verandi støðu ikki eru stórir – og at tað skulu stórar broytingar til, um støðan í økinum skal broytast munandi. Ætlanirnar um undirsjóvartunnil millum Streymoy og Sandoy er greitt ein broyting, sum fer at ávirka gongdina í Sandoynni rætta vegin.

Arbeiðsritið kann takast niður í pdf-formati á heimasíðu okkara *www.region.fo* undir Útgávur og Arbeiðsrit og fæst eisini í pappírs-formi við at venda sær til Granskingardepilin fyri Økismenning.



KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag

# Partabrøv ikki sloppin enn

MARKNAÐARRÁK

Partabrøv endaðu farnu viku á leið á sama stigi sum tá hon byrjaði. Tey byrjaðu vikuna við at lækka 3%-4%, men komu so fyri seg aftur. Hóast betraðu gongdina seinastu dagarnar ráða vit til at vera varin á partabrævamarknaðinum nakað enn. Sum heild vænta vit, at hetta er ein korrektión, og at langtíðar rákið, sum hevur verið uppeftir síðan 2003, eisini fer at vera galdandi, tá hendan korrektiónin er av. Eitt sum stuðlar hesum sjónarmiði er, at partabrøv í vinnugreinum, sum standa seg illa tá tað gongur illa í búskapinum, nú halda áfram at geva góðan vinning í mun til onnur partabrøv. Tó eru útlit fyri, at marknaðirnir kunnu lækka 5% aftrat, áðrenn tað av álvara fer at ganga uppeftir aftur.

## Dollarin helt á at vikna

Í farnu viku skrivaðu vit, at tað var áhugavert at dollarin var viknaður, hóast bæði amerikonsk partabrøv og rentur hækkaðu. Hetta vísti seg eisini at vera eitt veikleikatekin. Dollarin helt á at vikna í farnu viku, lækkaði 1,5% úr 5,68 til 5,60 krónur fyri dollaran. Í desembur var hann niðri á 5,58, og um hann fer niðurum, kann væntast at hann fer longur. Hann var veikast í 1995, tá hann var niðri á 5,32. Tó er hann lækkaður nógv í seinastuni, og tað verður torført at koma niður um 5,50 í fyrstu atløgu.

## Lánsbrævarentur støðugar

Lánsbrævarenturnar hava verið støðugar hesa farnu vikuna. 10-ára rentan er 3,93%. Nú liggja lánsbrævarentur og danda eftir lækkingina seinastu 3 vikurnar. Um órógvin á partabrævamarknaðinum heldur uppat, hækka renturnar væntandi aftur.

## Hesa vikuna

Fyri tíðina snýr alt á marknaðunum seg um USA, og soleiðis verður eisini hesa vikuna. Tjóðbankin, Fed, hevur rentufund mikukvøldið. Rentan verður væntandi óbroytt á 5,25%, men stórur áhugi er fyri, hvat tey siga í tíðindaskrivinum eftir fundin. Eisini kann talið av nýbyrjaðum húsum í USA flyta marknaðirnar, tí húsamarknaðurin hevur leingi verið í andgletti.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 559,88 | -0,9% | ↓ |
| JPY | 4,76 | -0,7% | ↓ |
| GBP | 1.088,59 | -0,3% | ↓ |
| NOK | 91,32 | -0,8% | ↓ |
| SEK | 80,18 | 0,1% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,62 | 0,1% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 128,12 | 0,3% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 617,50 | 0,0% | → |
| KB Trygg Eurostoxx | 106,85 | -0,1% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*